# Martin og fuglfirðingar jólakonsert

Martin Joensen er gestasangari á jólakonsert í Fuglafjarðar kirkju leygardagin 13. desember kl. 19.00. Eisini verður eitt valalið av fuglfirðingum, sum syngja og spæla. Á konsertini eru hesi við: Martin Joensen, gestasangari, Fuglafjarðar Hornorkestur, Teir 8, Blandaða Kórið, Manskórið í Thabor, Lonakórið og Sangbólkur í missiónshúsinum. Solistar: Niels Midjord, Peter J. Eliasen, Hannis Hansen, Helgi Midjord, Bárður á Lakjuni, Lív Næs, Dina Larsen og Rúni Hentze. Í steðginum verður andakt við Una Næs, presti. Eisini verður høvi at fáa eina drekkamunn í kirkjukjallaranum.



# ung hótt

- Vit vilja ikki leggja navn til eina ráðgeving á ivasomum, fakligum støði, tí tað kann gera størri skaða enn gagn.

- Vit leggja eisini stóran dent á at varðveita eitt høgt trúvirði, tí tað eru bæði fjølmiðlar, pedagoglesandi, skúlaflokkar og onnur, sum venda sær til okkara og brúka okkum sum álítandi keldu til hagtøl og upplýsandi tilfar.

- Vit eru viðurkend og nógv brúkt sum upplýsandi kelda og vit eru ofta biðin um okkara sjónarmið um ymsar spurningar í sambandi við børn og ung.

- Tí er tað alt avgerandi at varðveita eitt fakliga høgt støði, sigur Alice Simonsen.

Hon sigur, at tí er tað ein sannroynd, at skal "Tú & Eg" ráðgevingin halda fram, er tað avgerandi neyðugt, at vit fáa neyðuga játtan, tí samskiparar og tey ungu starvsfólkini eru lønt fólk.

### Tórført at fáa glið á

Og at tað er harðliga brúk fyri hesi hjálpartænastu, ivast hon ikki eina løtu í.

- Tey, sum ringja, eru dulnevnd og tey, sum ráðgeva, eru eisini dulnevnd, og tá ið tey tosa við ráðgevan hjá Barnabata, er tað ofta fyrstu ferð, at tey seta orð á teir trupulleikar, tey hava.

- Tað er kann verða lættari at fortelja um svárar trupulleikar fyri einum dulnevndum ráðgevara, enn tað er at fortelja tað fyri foreldrunum, flokslæraranum, læknanum ella onkrum øðrum vaksnum, tey kenna.

Ráðgevarin roynir so at hjálpa teimum, sum ringja, at seta orð á teir trupulleikar, tey hava at dragast við.

- Tað kann verða ómetaliga tórført hjá børnum og ungum at fortelja fyri øðrum, at tey hava so stórar trupulleikar, at tey eru komin so langt út á eggina, at tey ganga í sjálvmorðstankum, ella at tey meiðsla seg sjálvi, sigur samskiparin hjá Barnabata.

- Tað kann vera ómetaliga tórført hjá teimum at seta hol á, so ráðgevararnir hava eisini útbúgving í at tosa við børn og ung, so at teir duga at hjálpa teimum, sum kjatta ella ringja, at fáa glið á.

- Ráðgevararnir bæði duga og hava stundir at lurta og so royna at hjálpa og stuðla so væl sum til ber. Teir kunnu geva góð ráð um, hvat tann, sum ringir, kann gera sjálvur. Men ofta er brúk fyri, at onkur vaksin hjálpir til, og í slíkum førum roynar ráðgevararnir eisini at koma við uppskotum um onkran vaksnan, og almennar tænastur, tey kunnu tosa við um teir ávísu trupulleikarnar.

- Tað kann vera foreldrini, ella onkur annar vaksin, tey hava álit á, kanska heilsusysturin í skúlanum, flokslærarin, ella onkur annar.

### Rakar ymiskt

Alice Simonsen sigur, at ráðgevararnir brúka eisini nógva tíð at fortelja teimum sum ringja eftir hjálp, um teirra rættindir og um ST-barnarættindasáttmálan.

Tað liggur eisini ráðgevarunum nógv á sinni at børnini og tey ungu, sum ringja, ikki skulu føla seg sum eina byrðu fyri ráðgevaran, hóast tey kanska hava ringt fleiri ferðir.

- Tað hevur stóran týdning at fortelja børnunum og teimum ungu, at vit eru altíð til reiðar at lurta og at ongin trupulleiki er ov stórur og ongin er ov lítil, sigur Alice Simonsen.

Hon leggur afturat, at sjálvandi kann tað vera so ymiskt, hvat børn og ung uppfata sum so álvarsligar trupulleikar, at tey halda tað vera neyðugt at ringja til ráðgevingina.

- Tað einasta, sum hevur týdning er, at følir viðkomandi, at talan er um ein trupulleika, so er tað ein trupulleiki, sum skal takast í fullum álvara.

- Hjartasorg kann vera næstan ein óloysandi trupulleiki hjá onkrum, men tað kann vera ein bagatell hjá einum øðrum, tað er so ymiskt, tað rakar, sigur samskiparin.

Hon ivast ikki í, at skuldi tað hent, at ráðgevingin dettur niðurfyri, tí at Løgtingið ikki vil játta neyðugan pengin, er tað ein álvarligur smeitur fyri børn og ung við trupulleikum.

- Vit eru dagliga í sambandi við børn og ung, sum tað hevði verið ein vanlukka fyri, at hendan ráðgevingin gevst.

- Ráðgevararnir fáa hvønn einasta dag váttan fyri, hvussu stóran týdning, "Tú & Eg" ráðgevingin hevur, tí hjá nógvum er tað ómetaliga umráðandi at fáa hesa hjálpina, sigur Alice Simonsen.



*- Tað kann verða ringt hjá børnum og ungum at fortelja fyri øðrum, at tey eru komin so langt út á eggina, at tey ganga í sjálvmorðstankum, ella meiðsla seg sjálvi, sigur Alice Simonsen, samskipari hjá Barnabata. Her situr hon inni á heimasíðunu www.eg.fo, har allir upplýsingarnir um Tú&EG ráðgevingina eru at finna, umframt annað tilfar*

an varir. Tað ger, at tey, sum ringja, føla, at tey verða tikin í fullum álvara við teirra trupulleikum.

Alla ta fyrstu tíðina,"Tú & Eg" ráðgevingin var, vóru tað mest gentur, sum ringdu, men hesa seinastu tíðina hevur gongdin verið tann, at fleiri og fleiri dreingir eisini eru farnir at ringja at leita sær ráð fyri trupulleikum av ymsum slag.

- Vit eru glað fyri, at dreingir eisini kenna seg meira og meira tryggar við at seta orð á sínar trupulleikar, sigur samskiparin hjá Barnabata.

### Mest uppundir jól

Tað vísir seg eisini, at tær flestu umbønirnar til ráðgevingina hjá Barnabata um hjálp, eru komnar í oktober og november.

- Bara síðani 1.oktober í ár til í gjár, høvdu 149 børn og ung leitað sær hjálp hjá ráðgevingini, so tað er eitt stórt tal. Í oktober í ár hava 82 børn og ung leitað sær hjálp hjá ráðgevingini og frá 1. november til í gjár, høvdu 67 ung verið í sambandi við ráðgevingina.

Hví so er, hevur hon samskiparin onga forklaring upp á.

Tað kann ikki vísast á, at rúsdrekkamisnýtsla er beinleiðis orsøkin til, at børn og ung ringja hetta tíðarskeiðið. Trupulleikar við rúsdrekka í sambandi við jólaborðhaldini og tilstundandi høgtíðina, eru ikki orsøkin til at børn og ung leita sær hjálp hesa árstíðina.

Men fyri tað, kann væl vera, at tað er ein undirliggjandi trupulleiki, tí tað er merkisvert, at tað er mest brúk fyri ráðgeving hesa árstíðina, sigur Alice Simonsen.

## Tú & Eg ráðgevingin

Tað eru tríggir møguleikar hjá børnum og ungum at koma í samband við "Tú & Eg ráðgevingina hjá barnabata.

Tað ber til at skriva, at ringja ella at kjatta beinleiðis við ein ráðgevara.

Ráðgevingin er opin mánadag og hósdag frá klokkan 14 til 22.

Telefonnummarið er 80 70 10.

Ráðgevingin púra dulnevnd. Tað merkir, at tað er ikki neyðugt hjá teimum, sum ringja, at siga, hvussu tey eita.

Tá ið tey kjatta við ein ráðgevara, er tað eisini í fullum trúnaði, so at ongin fær at vita, hvør tað er, sum kjattar.

Ráðgevararnir hjá "Tú & Eg" ráðgevingini, brúka nógva orku upp á at svara teldubrøvum.

Øll brøv og svør verða løgd á heimasíðuna, og tað er ein uggi hjá nógvum børnum og ungum at síggja, at tey eru ikki einsamøll við sínum trupulleikum og tað hjálpir teimum at lesa brøv hjá øðrum

Kjatturin verður nógv brúktir, serliga tá ið talan er um álvarsligar trupulleikar og tað hevur avgjørt sínar fyrimunir, tí tá er barnið, ella tann ungi í beinleiðis sambandi við ráðgevaran og fær svarið beinanvegin.

Annars fæst alt at vita um ráðgevingina á ungdómsportalinum hjá Barnabata, sum er at finna á www.eg.fo.

## Børn og ung nívd av svárum trupulleikum

Higartil í ár hava 523 børn og ung vent sær til ráðgevingina hjá Barnabata og niðanfyri nevna vit nakrar av trupulleikunum, sum hevur nívir tey. Fyrra talið, sigur, hvussu nógvar áheitanir eru komnar í 2008 og í klombrum stendur, hvussu gongdin er frá í fjør.

| Trupulleiki | til (aftur ímóti 2007) |
|---|---|
| Happing: | 30 (Lækkeing) |
| Sjálvskaðandi atferð: | 34 (Munandi hækking) |
| Kynsligur ágangur: | 41 (Munandi hækking) |
| Sjálvmorðtankar/-roynd | 19 (Hækking) |
| Kynslív: | 85 (Lækking) |
| Einsemi: | 35 (Munandi hækking) |
| Manglandi sjálvsálit | 26 (Hækking) |
| Kroppur og heilsa | 56 (Lækking) |
| Forelskilsi og kærleikslív | 77 (Lækking) |

Sum tað sæst, eru talið á teimum, sum hava heilt álvarsligar trupulleikar at dragast við, hækkað í ár aftur ímóti í fjør. Nevnast kunnu beinleiðis lívshóttandi trupulleikar, eitt nú sjálvmorðsroynd, sjálvmorðstankar, umframt sjálvskaðandi atburður og kynslig misnýtsla.

## Kynsligur ágangur fyllir meir

Verður hugt eftir tølunum fyri tey, sum ringja til Barnabata at fáa ráðgeving og hjálp fyri sálarligar trupulleikar, sæst at tey álvarsligastu málini, fylla meir í ár, enn tey gjørdu í fjør.

Av teimum 749 áheitanunum, ráðgevingin fekk í fjør, vóru 33 um kynsligan ágang, tað eru 4,43%. Av teimum 523 áheitanunum um hjálp, sum ráðgevingin hevur fingið higartil í ár, eru 41 um kynsligan ágang og tað svarar til 7,8%.

Teir trupulleikarnar, tey nevna sjálvskaðandi atburður, eru eisini munandi vaksnir í ár. Í fjør vóru teir 4,03% av samlaðu áheitanunum, í ár eru teir 6,5%.

Trupulleikarnir, tey nevna einsemi, eru eisini nógv vaksnir, við tað, at í fjør vóru teir 3,49% av samlaðu áheitunum, men higartil í ár eru teir 6,7% av samlaðu áheitanunum.

Sostatt sæst, at tey børn og ungu, sum hava sett seg í sambandi við ráðgevingina higartil í ár, hava nógv størri og meiri umfatandi trupulleikar at stríðast við, enn tey høvdu í fjør, sigur Barnabati.